ÍF-B36:

# 14 ár síðani seinasta ÍF sigurin

**Í Fuglafirði er ivasamt, um Allan Joensen verður førur fyri at verja málið, og fyrrverandi ÍF venjarin, sum nú er í B36, heldur talan vera um heilt annað mótstøðulið enn tað, sum hann vandi**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað eru tvey lið, sum tað hevur gingið heilt ymiskt hjá, sum hittast í Fuglafirði í morgin. Hjá ÍF hevur tað hilnast væl. Teir hava skorð átta mál, og teir hava fingið sjey stig. Hjá B36 hevur tað ikki gingið væl. Teir hava bara skorað eitt mál, men um teir vinna í morgin, so verða teir undir liðini á fuglfirðingum.

ÍF hevur ikki vunnið á heimavølli móti B36 síðani í 1991, tá úrslitið var 3-0. Í fjør var javnt, og B36 vann í 1999 4-1.

B36 venjarin, Sigfríður Clementsen, var í fyrraárið og fyrra partin av árinum í fjør venjari í Fuglafirði. Tí átti hann at kent fuglfirðingar og ÍF væl.

- Tað geri eg, men liðið hjá teimum er heilt øðrvísi nú, enn tað var, tá ið eg var venjari. Teir hava fingið Poul Ennigarð, Símun Eliasen og teir báðar útlendingarnar í álopinum, og tað hevur styrkt liðið hjá teimum nógv. ÍF eigur eitt gott lið, og uppgávan hjá okkum verður stór, men eg haldi, at vit hava møguleika at fáa øll stigini, sigur Sigfríður Clementsen.

B36 venjarin heldur ikki, at úrskurðurin hjá FSF í steypakappingini hevur ávirkað lagið millum spælararnar.

• Vit arbeiða nógv við at hava fokus móti Fuglafirði í morgin.

*Tað hevur ikki hilnast nakað serligt við málskjótingini?*

• Í venjingardystunum gekk væl, men í trimum teimum fyrstu umførunum í landskappingini hevur stígur verið í. Vit arbeiða við sakini, og vit rokna við, at vend fer at koma í. Fyri tveimum árum síðani gekk striltið hjá B36 í fyrstu umførunum. Teir megnaðu ikki at gera mál, men tá ið tað glapp, gekk tað rættuliga væl.

Í B36 eru allir teir somu tøkir, sum vunnu 1-0 á EB/Streymi.

**Ivamálið**

Í Fuglafirði er fótbóltslagið framvegis gott, og venjarin, Petur Simonsen, heldur, at teir hava orsøk at trúgva upp á, at tað hesa ferð skal bera til at fáa øll stigini.

- Góða gongdin ber størri sjálvsálit við sær. Bæði ímóti GÍ og Skála hevur liðið megnað fleiri ferðir at svara aftur, eftir at mótstøðumenninir hava skorað, og tað boðar frá góðum, heldur Petur Simonsen.

Sylla hevur ikki vant saman við hinum í vikuni, men teir rokna við, at hann verðúr førur fyri at spæla í morgin. Stóra ivamálið í Fuglafirði er, hvussu tað verður við málverjanum. Allan Joensen noyddist av vøllinum á Skála. Hóskvøldið var hann á vøllinum, men hann var ikki førur fyri at venja saman við hinum. Um hann ikki verður førur fyri at spæla í morgin, so verður Emil Toftagaard í málinum.

Hóskvøldið var Danny Rasmussen, sum áður hevur spælt við HB, í Fuglafirði og vandi, men hann fer ikki at spæla við ÍF.

Starvsøking www.runavik.fo




Eitt starv sum sosialráðgevi á Sosialu deild hjá Runavíkar Kommunu er leyst at søkja til setan 1. august 2005.

**Um Sosialu deild**

Sosiala Deild umsitur øll sosialmál, sum sambært lóg eru áløgd kommununi. Deildin virkar harumframt sum umsiting hjá avvarandi nevndum. Arbeiðsøkið umfatar m.a. barnaverndar-, dagstovna- og eldraøkið.

So hvørt sum fleiri málsøki verða flutt frá landsumsitingini til kommunurnar at umsita, verða fleiri uppgávur hjá Sosialu Deild at taka sær av. Frá 1. januar 2006 verður meginparturin av barnaverndarøkinum umsitið av kommununum.

**Starvið**

Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran, at taka tær av einum spennandi og fjølbroyttum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum, sum deildin tekur sær av. Eisini verður møguleiki til, frá byrjan at verða við til at uppbyggja deildina og arbeiðsgongdir á økinum.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.**

- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaforsorgarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakligt
- aðrar málsviðgerðaruppgávur á deildini

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið**

- er útbúgvin sosialráðgevi
- hevur royndir sum málsviðgeri
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógv annað um oyruni
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit bjóða tær**

Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú saman við leiðaranum hevur góðan møguleika at uppbyggja og menna Sosialu deildina frá grundini.

**Setanarviðurskifti**

Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið

**Fleiri upplýsingar**

Fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á Telefon 417000

**Søk starvið**

Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagið 11. mai 2005.

*Umsóknin skal sendast til:*

**Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**
*...ein kommuna í menning*

# FCK kom undan norskum ódnarveðri

**Hóast teir vóru kroystir mesta partin av tíðini, so eydnaðist tað FCK at vinna á Lerkendalen, og nú hevur FCK góðar møguleikar at spæla seg í finaluna**

ROYALA LIGAN
*Jóannes Hansen*

Keðiligu tíðindini í sambandi við FCK ferðina til Tróndheim vóru, at tað kortini ikki bar til hjá Toda Jónsson at fara við. Hann hevur lítlan skaða at dragast við.

Góðu FCK tíðindini vóru, at tað eydnaðist at vinna 1-0 á Rosenborg. Harvið er tað upp til FCK sjálvt at gera av, um felagið skal verða partur av fyrstu finaluni í Royalu liguni. FCK verður partur av finaluni, um tað eydnast teimum at vinna síðstu uppgerðina í millumspælinum. Talan verður um uppgerð móti Malmø í Parkini 28. apríl.

Einasta málið á Lerkendal hóskvøldið skoraði miðvallarin Hjalte Bo Nørregaard, tá ið fyrra umfarið var ein stívan hálvan tíma gamalt. Hann sendi flatt úr seytjan metrum og dygst inn við stólparótini, eftir at Álvaro Santos, sum mannaði álopið saman við Zuma, hevði lagt bóltin spakuliga útfrá.

Serliga í 1. hálvleiki var FCK undir ógvusligum trýsti. Men teir megnaðu at halda Rosenborg frá uppløgdum málmøguleikum. Sum 2. hálvleikur leið, vóru teir í Rosenborg at sleppa alt meiri í verjupartinum, og tá høvdu Zuma og norski Magne Hoseth onkrar góðar møguleikar at økja um FCK leiðlsuna.

Men tað løgdu teir í danska ferðalagnum einki í, tá ið svenski dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð, og FCK hevði øll trý stigini og møguleikan fyri finaluplássi í viðførinum aftur til Keypmannahavnar.